

# OLJUTINGIÐ

Petroleum Association of the Faroe Islands

**Kiropraktor**
Ári Rasmussen



Viðtala fæst:
Argjum 320212
Runavík 448102

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2647, Sp/f Sambygg, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Innkomin sum stjóri:
Eyðun Olav Askildsen, Fútalág 20b, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 2. apríl 2002

Kristin Balle

**Heimarøktin í Suðurstreymoy**

## Summarferiu-avloysarar 2002

**Heimasjúkrasystrar**
**Heilsuatstøðingar**
**Heilsuhjálparar/Heimahjálparar**

Søkt verður eftir summarferiuavloysarum at arbeiða í skiftandi vaktum í tíðarskeiðnum 15. juni til 30. september.

Okkum tørvar avloysarar bæði úti í Heimarøktini og inni á Eldrasambýlinum Oman Hoydalar.

Løn og setanartreytir samb. sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Onnu Mariu Oskarsson, økisleiðari, tlf. 321387.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi verður at senda til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Økisskrivstovan
Skálatrøð 14
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 24. apríl 2002.

## Skrivstovunæmingur

At byrja skjótast gjørligt søkja vit eftir skrivstovunæmingi.

Umsøkjarin skal hava hægri handilsskúlaprógv.

Skrivlig umsókn verður at senda til P/F Poul Michelsen, Hoyvíksvegur 74, FO-100 Tórshavn.

Eru fyrispurningar læruni viðvíkjandi verða hesir svaraðir við at venda sær til Sólrun Michelsen ella Christian Danielsen á tlf. 314650.

**P/F Poul Michelsen**

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**

## Skeið í Aleksanderteknik

11. – 14. apríl verður skeið hildið í Aleksanderteknikki.

Tilmelding á tlf. 317755.
**Kostnaður:** 1.000 kr.

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli**
Frúutrøð 1 • postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

## KT-fólk til netrøkt og ráðgeving

Farodane hevur sum aðalstevnumið at gerast hin sjálvsagdi samstarvsfelagin. Ein fyritreyt at røkka hesum máli er, at vit hava besta fólkið á okkara liði. Á tann hátt einans kunnu vit geva viðskiftafólki okkara ta kvalifiseraðu tænastu, tey krevja. Sært tú hetta sum eina avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær.

**Starvið:**
Sum partur av ráðgevingardeild okkara kemur tú at takast við kundarøkt innan netrøkt og ráðgeving. Partar av arbeiðinum er projektorienterað, eitt nú við implementering av størri loysnum. Virkisøkini eru net, ambætarar, trygd, firewalls, antivirus, Windows, ISA Server, MS Exchange, Linux og webhosting.

**Vit vænta, at tú:**
- ert til reiðar at taka ímóti nýggjum avbjóðingum
- hevur viðkomandi royndir innan økið
- hevur viðkomandi útbúgving
- ert álítandi og fyrikomandi

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- støðuga útbúgving á økinum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini sunnari fyritøku í menning
- 45 góðar arbeiðsfelagar

Lønarviðuskifti verða avtalað í samráð við leiðsluna.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. apríl 2002. Starvið verður sett skjótast til ber.

farodane 03-02

**FARODANE**

*Farodane er 51 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði, umframt skeiðtænastuna Kvasir.*

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo



· Hátalaraanlegg
· Teleslynguanlegg
· Tolkanlegg
· PA-anlegg

Tær røttu loysnirnar til:
· Samkomuhús
· Kirkjur
· Skúlar
· Handlar
· Ítróttarhallir
· Hotel & gistingarhús

**Fokus Electronic**
Reynstún 19 · Argir · Tlf. 311306

## Aðalfundur

Havnar Bjargingarfelag hevur aðalfund sunnudagin 21. apríl 2002 kl. 15.00 í hølunum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni.

Nýggir limir kunnu tekna seg

**Nevndin**



## Lastbilførara

Sóknast verður eftir lastbilførara við tí stóra koyrikortinum.

Áhugaði kunnu venda sær til P/F Poul Michelsen tlf. 314650.

**P/F Poul Michelsen**

demich
Stiðjagøta 2 – Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 311071 – fax: 310460
e-mail: demich@demich.fo

## Lærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vegna økjandi virksemið, søkja vit eftir lærlingi til handil okkara, læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bílegging av vørum o.a.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru, er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 12. apríl 2002.

## Praktikkvegleiðarar

**Til ábyrgdarhavandi sjúkrasystrar, sum eru praktikkvegleiðarar hjá næmingum frá Almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri og praktikkvegleiðarar hjá lesandi frá Sjúkrasystraskúla Føroya.**

Mint verður á at skriv okkara dagfest 25. januar 2002 stendur við um ikki at taka praktikantar.

**Sjúkrasystrafelag Føroya**

## Norðoya Røktarheim

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til heimið frá 15. mai til 30. september 2002. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrasystrar, sjúkrahjálparar og heilsuatstøðingar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatión, verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist: 20. apríl 2002.

## Deildarleiðari til virksemi í Smiðjugerði, Tórshavn

**Virksemi talan er um er: "Vinnuskeið". "Vart verkstað". Og "Umsorganararbeiði"**

**Arbeiðsuppgávurnar**
Arbeiði fevnir um at verða við til at byggja upp eina fjøltotta og spennandi deild teimum arbeiðstarnaðu at frama. Arbeiðsøkið verður at hava um hendi dagligu leiðsluna og virksemi, og at luttaka í vanliga arbeiðnum á deildini.

**Førleikakrøv**
- hevur hóskandi útbúgving.
- hevur samstarvs- og leiðslu evnir, at bjóða ymiskum fakbólkum
- hevur áhuga og kunnleika at arbeiða teimum arbeiðstarnaðu at frama
- hevur innlit í eitt nú galdandi lógir innan økið
- hevur førleika til at útføra og fylgja upp ásett arbeiði, eitt nú handliplanir

**Vit bjóða**
- Spennandi uppbyggingararbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- Tætt samstarv við fyristøðufólki
- Sera fjøltátta og sjálvstøðugt arbeiði
- Skeiðmøguleikar

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólki
Starvið verður at seta 1. juni 2002 ella skjótast tilber.
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, lønarflokkur 6.
Stýrið kann skila sær rætt til ongan at seta.

Áhugaði verða biðin um at seta seg í samband við Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135 fyri at fáa útflýggja viðkomandi tilfarð.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2002.**
Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m.skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Boks 301
110 Tórshavn

**brævbjálvin skal viðmerkjast: "umsókn deildarleiðari"**

**"Vinnuskeið"**
*Endamáli við hesi eindini, er at royna og venja arbeiðsevnini hjá tí arbeiðstarnaða, fyri at meta um arbeiðsmøguleikan hjá tí einstaka. At skipa fyri arbeiðsvenjing, við atliti til, at tann arbeiðstarnaði fær arbeiði ella kemur undir útbúgving.*

**"Verkstaði"**
*Endamáli við hesi eindini er at geva arbeiðstarnaðum fólki, sum ikki hava útlit til at klára seg á vanliga arbeiðsmarknaðinum, men sum hava tørv á at vera dagliga virkin á ein hvønn hátt, møguleika fyri at upplærast til at útinna t.d. lættari handverk.*

**"Umsorgararbeiði"**
*Ætla fyritíðarpensionistum, ið hava tørv á at koma saman við øðrum, møguleika fyri at útføra lættari handverk, virksemi ella hugna. Hetta fyri at fáa ein meira innihaldsríkan og stimbrandi dagligdag.*

## Reingerðarfólk til Miklagarð

**Miklagarður í SMS sóknast eftir reingerðarfólki at byrja skjótast tilber.**

Løn eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð og spyr eftir Johnny Priess.

**MIKLAGARÐUR**
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 11

**Føroya Felag Móti Krabbameini**

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia 23. apríl 2002 kl. 19.00.

Skrá sambært lógum.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/ Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg